Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Birita Poulsen er Ársins Songrødd 2009



Bert 15 ára gomul megnaði Birita Poulsen at ogna sær heitið sum Ársins Songrødd 2009

**Leygarkvøldið var finalan av Ársins Songrødd hildin á Kambsdali, og 15 ára gamla Birita Poulsen bleiv kosin Ársins Songrødd 2009**

Nú er Ársins Songrødd funnin. Seinasta umfarið var hildið leygarkvøldið í høllini á Kambsdali, og gjørdist tað 15 ára gamla Birita Poulsen, ið fór avstað við sigrinum.

- Eg hevði als ikki væntað at vunnið. Eg haldi, at Alvilda var sera góð og at største kappingin var ímillum okkum báðar, sigur Birita.

Nógvir ungdómar hava roynt seg í undanumførunum, sum hava verið kring landið seinastu vikurnar, og tvey tey bestu frá øllum undanumførunum kappaðust leygarkvøldið, tá ið dómararnir staðfestu, at Birita Poulsen var tann besta.

- Sum heild haldi eg, at framførslurnar vóru sera góðar, og at støðið á luttakarunum var ógvuliga javnt, sigur Birita Poulsen.

**10.000 krónur og við Múrin**

Vinnarin av Ársins Songrødd fær 10.000 krónur og fær møguleikan at framføra á festivalinum við Múrin. Sostatt er greitt, at Birita Poulsen verður at síggja á pallinum í Kirkjubø í summar.

- Eg gleði meg ótrúliga nógv at sleppa at framføra við Múrin. Tað er stórt í mínum hugaheimi, sigur Birita.

Spurd um, hvat hon fer at nýta peningin til, sigur Birita soleiðis.

- Eg fari at goyma teir til eg skal á AFS í Spania, sigur hon.

Festivalurin við Múrin verður ikki einasti høvið føroyingar fáa at hoyra nýggju songrøddina, tí í morgunsendingini hjá Rás2 týsmorgunin 5. mai, fer unga songkvinnan at syngja beinleiðis fyri lurtarunum.

**Finalan eitt ordans brak**

Umframt sjálva kappingina, var eisini nógv annað á skránni. Vælumtókti Páll Finnur Páll sangarin, Finnur Jensen, var eisini til staðar, og undirhelt hann áhoyrarunum eftir kappingina.

Eisini var ein mótaframsýning á skránni. Tað var undirklæðnahandilin SIRI, ið skipaði fyri framsýningini, og millum modellirnar var Connie Brockie, sum í næstum verður at síggja í donsku sjónvarpsrøðini Paradise Hotel.



Páll Finnur Páll sangarin, Finnur Jensen, trein á pallin eftir at vinnarin av kappingini var funnin



Nógv ung fólk vóru í Høllini á Kambsdali, tá ið endabresturin av Ársins Songrødd var leygarkvøldið.



Connie Brockie verður skjótt at síggja á skíggjanum í vælumtóktu donsku sendirøðini Paradise Hotel, og hon var eisini ímillum modellirnar, sum vístu fram undirklæði í høllini á Kambsdali